## Rógvi hevur fjepparar á netinum

Í Italia var tað rættuliga stórt, at ein føroyskur timburmaður í tveimum førum kundi skora ímóti italsku heimsmeistarunum ífjør, og haraftrat tvey sera vøkur mál. Italiumaðurin, Mario Castelli gjørdist so hugtikin av hesum, at hann stovnaði ein fanclub/fjepparafelag, sum nevnist "Rógvi Jacobsen Italian Fan Club". Tó er onkur svenskari og føroyingur eisini limur í felagnum. Tað ber til at finna italska fjepparafelagið hjá Rógva Jacobsen á www.facebook.com, og so leita undir "Rógvi Jacobsen". Tey, sum eru skrásett í Facebook-skipanina hava har møguleika til at gerast limir í fjepparafelagnum. Á síðuni hjá fjepparafelagnum eru nakrar góðar myndir av Rógva. Tó er alt fjepparasamskiftið á italskum, so har fáa tey fægstu her á landi verið við.



## Systirin fór at gráta

- Eg minnist dystin í 1990 ótrúliga væl. Eg havi verið 11 ár tá, og vit sótu øll heima og hugdu. Og tá vit skoraðu gjørdi eg sjálvandi eitt gallróp. Yngra systirin hjá mær hevur tá verið eini 2-3 ár, og eg minnist, at hon fór at gráta, so kløkk gjørdist hon av øllum rópinum. So tað tók sína tíð at sissa hana aftur. Og lívið í býnum var sjálvandi øgiligt aftaná. Nú er tað sjálvandi stuttligt at møta Eysturríki aftur, og eg skilji væl, at áskoðararnir vilja hava eitt líka gott úrslit, sum vit fingu ta ferðina. Men vit kunnu sum so ikki brúka tað úrslitið til so øgiliga nógv, sigur Jákup á Borg.

# Stórmeistarar til Klaksvíkar

**Í sambandi við 100-ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu, verður sera forkunnug talvkapping telvað komandi vikuna. Og tað er ikki av tilvild, at kommunan munadygt stuðlar uppundir átakið hjá Klaksvíkar Talvfelag og Talvsamband Føroya, tí gjøgnum søguna eru mong FM-steypini í talvi komin til høldar – tað verið seg í einstaklingum og í liðkappingini. Í landshøpi er Klaksvíkin í fremstu røð innan telvingina**

TALV

*Jógvan Joensen*



*Heini Olsen hevur møguleika at ogna sær IM-heitið á heimavølli. Bert ein IM-normur restar, áðrenn hann kann kalla seg altjóða meistara*

Klaksvík International 2008 er sterkasta kapping, sum telvað er í Føroyum nakrantíð. Tað er hepnast at fáa heili 4 stórmeistarar (GM) og 2 altjóða meistarar (IM) til kappingina. Meðalstyrkin uppá 2429 er, til sammetingar, beint oman fyri hægsta styrkitalið, nakar Føroyingur hevur havt gjøgnum tíðirnar. Og stórmeistarakappingin er veruliga altjóða, við luttakarum úr 7 londum: Litauen, Ongland, Póland, Svøríki, Finland, Danmark og Føroyum.

### Telvararnir

GM Saruna Sulskis (36), úr Litauen, hevur higartil í ár telvað 91 kappingartalv og er nr. 2 á styrkilistanum í heimlandinum.

GM Gawain Jones (21) úr Onglandi, er nummar 5 á enska styrkilistanum – ungur, lovandi telvari, sum er sera virkin – hevur telvað 129 kappingartalv í 2008.

GM Miroslav Grabarczyk (37) úr Pólandi er nummar 16 á polska ratinglistanum og hevur somuleiðis telvað 129 kappingartalv í 2008.

GM Ralf Åkeson (47) úr Svøríki, sera royndur telvari og er nummar 11 á styrkilistanum í heimlandinum og hevur telvað 118 talv í ár.

IM Tapani Sammalvuo (33) er nummar 2 á Finska styrkilistanum og hevur telvað 29 talv í 2008.

IM Esben Lund (32) úr Danmark hevur havt stóra framgongd í seinastuni og er á gáttuni til at gerast stórmeistari, nú hann hevur 2 GM-normar í skjáttuni. Hevur telvað 98 kappingartalv í 2008. Hevur frálæru í telving og er talvskribentur. Vandi føroysku unglingarnar til NM, sum var í Íslandi 2006.

FM Semcesen (22) úr Svøríki er ávegis altjóða meistaratittulinum og gongst eftir vild, kann hesin koma til høldar í Klaksvík komandi vikuna. Hevur telvað 150 talv í 2008.

FM Heini Olsen (39) úr Klaksvík. Ferfaldur FM-vinnari. Hevur higartil vunnið 2 IM-normar og nú restar bert tann eini, til tess at tilogna heitið Altjóða Meistari í Talvi (IM).

Martin Poulsen (24) úr Tórshavn. Ferfaldur FM-vinnari, sum fleiri ferðir, hesi seinnu árini hevur ligið framvið, at tilogna sær IM-normar.

Olaf Berg (22) úr Tórshavn. Enn eitt ungt spennandi føroyskt talent, sum seinasta árið hevur sýnt greiðar ábendingar um framgongd.

### Gylt høvi hjá Heina

Serligur spenningur er um lokali talv-oddafiskurin í Norðoyggjum, Heini Olsen, tekur av gylta møguleikanum og tilognar sær IM-heitið á heimavølli. Møguleikin er avgjørt til staðar, hóast neyðugt verður "at raka dagin", men grundað á meðalstyrkina í kappingini, er kravið til vunnin stig tilsvarandi lægri til tess at vinna heitið. Og Heini sýnist at vera væl fyri í løtuni. Fyrr í summar telvaði hann í Politiken Cup, men gjørdist júst ov stuttur til tittulin tá, hóast orkufreka telving ímóti Evropameistaranum Tiviakov og javnleik ímóti GM Krasenkow – báðir telvarar í heimselituni.

### Stórmeistarar ímóti føroyingum í 1. umfari

Føroyingarnir leggja bragdliga fyri, tá fyrsta umfar í kappingini verður telvað leygardagin kl. 14 í fimleikahøllini við musikskúlan. Heini Olsen hevur hvíta fólkið ímóti GM Gawain Jones. Olaf Berg hevur somuleiðis hvíta fólkið ímóti GM Sarunas Sulskis, meðan Martin Poulsen, við svarta fólkinum, telvar ímóti GM Miroslav Grabarczyk.

### Fylgið telvingini LIVE

Umframt, at tað er møguligt hjá áhugaðum at leggja leiðina framvið spælistaðnum, verður møguleiki fyri at fylgja telvingini beinleiðis um alnótina, meðan telvað verður, á heimasíðu Talvsambandsins *www.faroechess.com* Somuleiðis fer Miðlahúsið – Portalurin, Rásin og Sosialurin - leypandi at kunna um feskastu tíðindini frá kappingini.

**SKRÁIN**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11. oktober | Leygardag | 1. Umfar | kl. 14.00 |
| 12. oktober | Sunnudag | 2. Umfar | kl. 16.00 |
| 13. oktober | Mánadag | 3. Umfar | kl. 14.00 |
| 14. oktober | Týsdag | 4. Umfar | kl. 14.00 |
| 15. oktober | Mikudag | 5. Umfar | kl. 10.00 |
| 16. oktober | Mikudag | 6. Umfar | kl. 18.00 |
| 16. oktober | Hósdag | 7. Umfar | kl. 14.00 |
| 17. oktober | Fríggjadag | 8. Umfar | kl. 09.30 |
| 18. oktober | Leygardag | 9. Umfar | kl. 09.30 |
| 18. oktober | Leygardag | Virðislønarhandan | kl. 14.00 |

| Tittul | Telvari | Tjóð | Styrkital |
|---|---|---|---|
| GM | Sarunas SULSKIS | Litava | 2572 |
| GM | Gawain JONES | Ongland | 2548 |
| GM | Miroslav GRABARCZYK | Pólland | 2516 |
| GM | Ralf ÅKESSON | Svøríki | 2484 |
| IM | Tapani SAMMALVUO | Finnland | 2464 |
| IM | Esben LUND | Danmark | 2425 |
| FM | Daniel SEMCESEN | Svøríki | 2402 |
| FM | Heini OLSEN | Føroyar | 2376 |
| | Martin POULSEN | Føroyar | 2281 |
| | Olaf BERG | Føroyar | 2227 |